# Listaleypurin

## skúlaárið 11–12



# TILBOÐ SKÚLAÁRIÐ 2011–12:

**Janus er ein stjørna** ........ s. 5
(1.–7. flokkur, 26.–30. september 2011)
**Tekning og vatnlitir** ........ s.6
(4.–10. flokkur, frá skúlabyrjan til jólafrítíðina eftir avtalu)
**Revurin við silkiturriklæðinum** ........ s. 7
(Forskúli og 1.–3. flokkur, 17.–28. oktober 2011)
**Í Vesterled** ........ s. 8
(2.–5. flokkur, 1.–6. november 2011)
**Dreymurin hjá Bobroshkov** ........ s. 9
(Allir aldursbólkar, 16.–20. januar 2012)
**Poetry slam** ........ s. 10
(8.–10. flokkur, 6.–10. februar 2012)
**Graffitirokning** ........ s. 11
(4.–10. flokkur, 27. februar–2. mars 2012)
**Heimagjørdi blásarabólkurin** ........ s. 12
(Forskúli, 1.–7. flokkur, februar 2012 eftir avtalu)
**Phønix** ........ s. 13
(1.–7. flokkur, 16.–20. apríl 2012)
**Ævintýrlig ævintýr** ........ s. 14
(Forskúli, 1.–3. flokkur, 30. apríl–8. mai 2012)



# LISTALEYPURIN **SKÚLAÁRIÐ 11–12**

Listaleypurin er ein mentanarlig verkætlan, sum Norðurlandahúsið, Kommunusamskipan Føroya og Føroya kommunufelag skipa fyri við stuðli frá Mentamálaráðnum. Endamálið er at geva fólkaskúlanæmingum og forskúlanæmingum høvi at uppliva góða yrkislist.

Eitt fjølbroytt tilboð verður fyriskipað hvørt ár, og síðan Listaleypurin varð stovnaður í januar 2008, hava skúlanæmingar á hvørjum ári upplivað millum 50 og 80 framførslur, verkstovur og framsýningar.

Listafólkini søkja sjálv um luttøku, og ein nevnd við umboðum úr skúlaverkinum og listaheiminum metir um dygdina á umsóknunum. Nevnd og listafólk áseta aldursbólkin, ið verkið hóskar best til.

Dentur verður lagdur á at røkka ymsum aldursbólkum og at spjaða listavitjanirnar um alt landið. Tær vitjanir og framsýningar, ið Listaleypurin bjóðar, eru ókeypis hjá skúlunum í luttakandi kommununum. Verkætlanarleiðarin leggur skránna í samráði við skúlarnar og listafólkini.

Í desember 2010 varð nýggjur sáttmáli undirskrivaður millum landstýriskvinnuna við mentamálum, formenninar í Føroya kommunufelagi, Kommunusamskipan Føroya og stjóran í Norðurlandahúsinum. Listaleypurin hevur nú fingið rúmari karmar, og tilboð eru eisini komin til forskúlarnar og elstu barnagarðsnæmingarnar.



## VIT MÆLA TIL:

- at lærarar gera listavitjanina til ein part av námsætlanini, sum verður latin inn miðskeiðis í september,
- at teldutøka tekningarskjalið fyri alt árið verður sent inn **áðrenn 15. september 2011**. Eftir hetta verður skráin løgd fyri árið.

Ivast ein skúli í, um kommunan er við í verkætlanini, mæla vit honum til at seta seg í samband við verkætlanarleiðaran, kommunustýrið ella avvarðandi kommunufelag.




## TEKNINGARSKJAL OG KUNNING Á **WWW.LISTALEYPURIN.FO**

FYRISKIPARAR:

Norðurlandahúsið í Føroyum, Føroya kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya – við stuðli frá Mentamálaráðnum.

UMSITING:

Listaleypurin við Hedvig Westerlund-Kapnas, verkætlanarleiðara,
Norðurlandahúsið í Føroyum, postrúm 1260, FO 110 Tórshavn, hedvig@nlh.fo, tel. 21 01 25.

## LISTAGREIN: TÓNLEIKUR OG ÆVINTÝR

| | |
|---|---|
| Heiti: | **Janus er ein stjørna.** |
| Listafólk: | Aldubáran við floytu, fagott, horni, trompet, trombon og gittara umframt ein sjónleikari. Tónasmiðir eru Andras Olsen og Páll Sólstein. Edvard Fuglø hevur skrivað og myndprýtt søguna. |
| Málbólkur: | 1.–7. flokkur, í mesta lagi 200 næmingar. |
| Longd: | 35–40 minuttir. |
| Fyrireiking: | Næmingar og lærarar skulu helst lesa søguna frammanundan. |
| Krøv: | 7 stólar, uppvørpa og lørift. |
| Tíðarskeið: | **26.–30. september 2011.** |



Janus er ein stjørna varð sýndur í skúlum í februar 2011 og varð so umbiðin, at avgjørt varð at vitja fleiri skúlar í heyst. **Tað merkir, at tiltakið er fullteknað frammanundan**. Sýningin er gjørd um søguna Janus er ein stjørna eftir Edvard Fuglø. Søgan er stytt og verður framførd saman við tónleiki.

Nú á døgum eru børn von at hoyra tónleik til filmar og søgur í sjónvarpi, men vita sjáldan, hvørji ljóðini og ljóðførini eru. Í hesi framførslu uppliva tey tað tætt hjá og knýta søgu og ljóð saman.

## LISTAGREIN:
## **MYNDLIST**

**Heiti:** **Tekning og vatnlitir.**
**Listafólk:** Jógvan S. Biskopstø.
**Málbólkur:** 4.–10. flokkur, í mesta lagi 20 næmingar, um ikki onnur avtala er gjørd.
**Longd:** 3 tímar.
**Krøv:** Evningsstova, blýantar, pappír og vatnlitir.
**Tíðarskeið:** **Frá skúlabyrjan til jólafrítíðina eftir avtalu.**



At kunna gera einfaldar blýantsskitur er umráðandi hjá teimum, ið skulu arbeiða við sniðgeving, arkitekturi, grafikki ella list. Tí seta vit listaverkið hjá næminginum í miðdepilin. Greitt verður frá, hvussu ein blýantsskitsa verður uppbygd, og vit fara út í náttúruna at gera skitsur. Dentur verður lagdur á at síggja náttúruna við øðrvísi eygum og at varnast formar, kompositiónir, ljós og skuggar. Innafturkomin gera vit vatnlitismyndir eftir skitsunum. Vit enda við samandrátti og finna munir og líkskap millum skitsu og mynd.

## LISTAGREIN:
## **MARIONETTLEIKUR**




**Heiti:** **Revurin við silkiturriklæðinum.**
**Listafólk:** Karavella Marionettteatur við Rakel Helmsdal.
**Málbólkur:** Forskúli og 1.–3. flokkur, í mesta lagi 50 næmingar.
**Longd:** Um 50 minuttir. Hølið má vera tøkt 2 tímar undan sýning, og 1 tíma eftir sýning.
**Eykatilfar:** Lærarin fær eitt hefti, har Rakel greiðir frá, hvussu ein ger einfaldar livandi dukkur saman við børnunum, t.d. hond- og fingradukkur, og hvussu lærari og børn kunnu gera ella finna søgur til leikir.
**Krøv:** Myrkalegging og streymur. Eitt rúm við plássi til áskoðarar og eitt leikhús á 2x1 metur. Flestu skúlastovur kunnu nýtast, um borð og stólar verða flutt út.
**Tíðarskeið:** **17.–28. oktober 2011.**

Revurin við silkiturriklæðinum er frásøguleikur, sum byggir á klassiska ævintýrið um køttin í stivlum. Eitt óvanligt ævintýr, har kötturin er hetja, hóast hann bæði lýgur og hóttir, og har myllarasonurin bert skal hava álit á køttinum fyri at vinna ríkidømi og kongsdóttur. Ævintýrið vísir, at vit kunnu vera eydnurík, hóast útlitini eru ring. Børn, sum ikki kunnu ávirka umstøður sínar stórvegis og eru vónsvikin av miseydnaðum royndum, kunnu finna ugga í søguni. Tað loysir seg at varnast tær smáu gerðirnar. Leikurin líksit nógv ævintýrinum, men persónarnir eru broyttir, so at myllarasonurin er ein seymikonudóttir, køtturin ein revur, kongurin ein drotning o.s.fr.

## LISTAGREIN: **TÓNLEIKUR, DANSUR, FRÁSØGN, SJÓNLEIKUR**

**Heiti:** **Í Vesterled.**

**Listafólk:** Úr Noregi: Annika Ostwald og Ida Uvaas, koreografar og dansarar, Torgrim Mellum Stene, frásøgumaður, og Hilde Bjerkeskaug, sjónleikari. Úr Føroyum: Jens L. Thomsen, tónleikari.

**Málbólkur:** 2.–5. flokkur. Næmingar verða bólkaðir í tíggju og liva við í leikinum. Tá fyrsti bólkur er komin nakað ávegis, byrjar tann næsti, og á tann hátt føla børnini, at tey eru umráðandi partur av søguni. 6–8 bólkar kunnu vera við til eina sýning.

**Longd:** 60 minuttir.

**Fyrireiking:** Skúlin skal hava bólkað børnini áðrenn vitjanina og skipa dagin soleiðis, at til ber at fara í gongd við uml. hálvum tíma millumbili.



**Krøv:** Trý sjálvstøðug rúm til tær tríggjar statiónirnar í leikinum, t.d. floksstovu, gongd og garderobu ella annað. Eitt av rúmunum má vera 6x8 metrar, hini í minsta lagi 4x5 metrar. Stikkkontakt og vanligt ljós í hvørjum rúmi.

**Tíðarskeið:** **1.–6. november 2011.**

Søgan byggir á gamla grønlendska søgn um tilknýti menniskjans við sjógvin. Langt niðri á havsins botni, í djúpasta myrkri, á eini ístrónu, situr Sedna. Hár hennara hongur sítt um akslar, tjúkt og samanfløkt av ruski frá menniskjum. Í mong túsund ár hevur hon sent teimum treingjandi fisk og havdjór, men nú hava tey gjørt hana vánda og illa í huga.

## LISTAGREIN: **DANSILEIKUR**

**Heiti:** **Dreymurin hjá Bobroshkov.**

**Listafólk:** Úr Noregi: Annika Ostwald, Gry Løvmo, Ingeborg Dugstad Sanders og Sara Lindström, dansarar. Úr Onglandi: Alice Cade, koreografi, ljóð og ljós.

**Málbólkur:** Allir aldursbólkar, í mesta lagi 300 næmingar.

**Longd:** 20 minuttir. Høvi er til samskifti millum næmingar og listafólk eftir sýningina.

**Krøv:** Rúm við plássi til áskoðarar og pall á 5x6 metrar. Hartil streymstikk, ein sofa, ein borðlampa og ein gólvlampa. Best er, um skúlin hevur ljós- og ljóðanlegg, annars finna listafólkini aðra loysn. Bólkurin skal kunna vera í rúminum 2½ tíma fyri sýning og ½ tíma eftir sýning.

**Tíðarskeið:** **16.–20. januar 2012.**



Dreymurin hjá Bobroshkov er ein dárandi og dreymakendur dansileikur – kveiktur millum tað fjálga hjartað og einsligu tilveruna hjá einum gomlum manni. Vit eygleiða lívið og verðina gjøgnum eyguni á tí gamla, og farnar tíðir daga fram. Myndir og metamorfosur lýsa gandakendar vónir og dreymar, sum livna og spretta, tá ið ein gamal maður knossast við at lata seg í inniskógvarnar.

LISTAGREIN:
## YRKINGALIST



**Heiti:** **Poetry slam.**
**Listafólk:** Kjartan Hansen, FO. Lasse Thorning, DK.
**Málbólkur:** 8.–10. flokkur, í mesta lagi ein skúlaflokkur.
**Longd:** 3 tímar.
**Krøv:** Netsamband, uppvørpa, mikrofon, blýantar og pappír.
**Tíðarskeið:** **6.–10. februar 2012.**

Kjartan og Lasse hava drúgvar royndir í poetry slam. Lasse gjørdist danskur meistari í 2008 og hevur síðan sett sín dám á danskt poetry slam, bæði sum yrkjari, framførari og undirvísari. Kjartan fekk sjónleikaraprógv í Svøríki í 2010 og vann føroysku poetry slam kappingina í 2010. Kjartan og Lasse vísa, hvussu ein skipar poetry slam og framføra sjálvir. Síðan verða næmingarnir koyrdir í bólkar at gera sínar egnu yrkingar, og dagurin endar við poetry slam kapping millum næmingarnar.



LISTAGREIN:
## GRAFFITI

**Heiti:** **Graffitirokning.**
**Listafólk:** Rasmus Balstrøm, street art málari, DK, Loui Andersen Salinas, støddfrøðilesandi, DK.
**Málbólkur:** 4.–10. flokkur, í mesta lagi ein skúlaflokkur.
**Longd:** Ein skúladagur, um 6 tímar.
**Krøv:** Blýantar, viskileður, pappír.
**Tíðarskeið:** **27. februar–2. mars 2012.**

Vit brúka Fibonacci talrøðina til at knýta saman náttúru, list og støddfrøði. Næmingarnir gera matematiskar tekningar og seta inn í Fibonacci talfrymil. Úrslitið er ein stór ramma, ið er samansett av tekningum hjá næmingunum. Verksmiðjan er í trimum: Fyrst verður ástøðið hjá Fibonacci lagt fram, og næmingarnir gera so tekningar, royna ástøðið og velja ta mynd, sum teimum dámar best. Síðan verður endaliga úrslitið skapt við litum og graffiti. Viðrar, kunnu vit fara út og gera størri mynd við spraydósum.



# LISTAGREIN: **TÓNLEIKUR**

**Heiti:** **Heimagjørdi blásarabólkurin.**
**Listafólk:** 3–8 tónleikarar koma á vitjan, alt eftir tørvi. Í bólkinum eru Andrea Heindriksdóttir, Annika Højgaard, Atli K. Petersen, Bernharður Wilkinson, Bjarni Berg, Christina Andersen, Eirikur Skála, Jan Rúni Poulsen, Jens Knudsen, Katja Volovelskaja, Kenneth Jones, Oddur Hentze, Ólavur Olsen, Peder Riis-Jensen og Rúni Kalsoy Mouritsen.
**Málbólkur:** Forskúli, 1.–7. flokkur, í mesta lagi 30 næmingar.
**Longd:** Ein skúlatími.
**Tíðarskeið:** **Februar 2012 eftir avtalu.**



Tá heimagjørdi blásarabólkurin kemur á vitjan, verður hetta kombinerað konsert og verkskeið. Tey spæla á heimagjørd ljóðføri sum til dømis gularótatrompet, plastrørfloytu og boyutuba og greiða frá, hvussu ljóð verður skapt á slagverki og blásturljóðføri sum heild. Síðan vísir bólkurin, hvussu næmingarnir kunnu gera síni egnu ljóðføri, og at enda verður samanspæl millum tónleikarar og næmingar.



# LISTAGREIN: **FÓLKATÓNLEIKUR**

**Heiti:** **Phønix, DK.**
**Listafólk:** Karen Mose, sangur, Anja Præst, klarinettir, Jesper Vinther, harmonika, Jesper Falch, slagverk. Til ber at lurta og hyggja á myspace.com/phonixfolk og youtube.com/phonixfolk.
**Málbólkur:** 1.–7. flokkur, í mesta lagi 150 næmingar í senn.
**Longd:** Um 40 minuttir.
**Krøv:** Fimleikahøll ella felagshøli. Bólkurin tekur PA anlegg við. Næmingarnir sita á gólvinum.
**Tíðarskeið:** **16.–20. apríl 2012.**

Phønix spælir danskan og norðurlendskan fólkatónleik á eini spennandi konsert, har svingandi løg, saftigar rútmur, vakrar sangir og eggjandi dansur verða knýtt saman av eksotistum ljóðførum og villum søgum.



# LISTAGREIN: **DANSILEIKUR**

**Heiti:** ***Ævintýrlig ævintýr.***
**Listafólk:** Helle Siljeholm og Sara Christophersen, dansarar og koreografar, NO.
**Málbólkur:** Forskúli, 1.–3. flokkur.
**Longd:** Ein skúlatími, har næmingar eisini hava høvi at spyrja og tosa við leikarar.
**Krøv:** Eitt rúm, sum hevur pláss til áskoðarar og til eitt leikøki, ið er minst 9 metrar djúpt og 6 metrar breitt. Hartil 16A streymstikk og myrkalegging, soleiðis at til ber at vísa film sum part av framførsluni. Uppseting tekur 2 tímar, niðurtøka 45 minuttir. Bólkurin tekur ljóð- og ljósútgerð við.
**Tíðarskeið:** **30. apríl–8. mai 2012.**



Dansisýningin Ævintýrlig ævintýr tekur okkum inn í ein heim við hugtakandi og litføgrum samansetingum av dansi, sjónleiki og teknifilmi. Hetta er søgan um ein magiskan ævintýrskóg, ein fantastiskan ævintýrskóg, tann ævintýrligasta ævintýrskógin í allari verðini, har alt er gleði, sátt og semja. Men ein dagin stjelur tann dapri skuggin Skuggi hjartað í skóginum – gullskógvarnar. Uttan skógvarnar doyr skógurin! Hvør kemur til hjálpar? Tað fáa vit at síggja í einum framúr hugtakandi og spennandi leiki.



# HVUSSU VIRKAR LISTALEYPURIN?

- Hvørt skúlaár verður ein faldari við listatilboðum sendur skúlunum í øllum luttakandi kommunum.
- Skúlar og forskúlar kunnu bíleggja listafólkavitjan við at fylla út teldutøkt tekningarskjal á www.listaleypurin.fo.
- Verkætlanarleiðarin váttar bíleggingina og skipar fyri skúlavitjanum í samráði við skúla og listafólk.
- Eftirmetingarskjal verður sent kontaktlæraranum, ið hevur ábyrgd av, at næmingarnir sleppa til orðanna.

**Vit mæla til:**

- at næmingaumboð eru við til at velja tey listaverk, ið skúlin biður um,
- at næmingaumboð taka ímóti listafólkunum og vísa teimum runt á skúlanum,
- at skúlin framhaldandi ger vart við síni ynski, hóast ógjørligt er at eftirlíka øllum ynskjum.

**Vit taka ábyrgd av:**

- at listaverkini eru góðkend av nevnd, sum umboðar bæði yrkislistafólk og lærarar,
- at skúlar í luttakandi kommunum um alt landið fáa vitjan,
- at virka fyri góðum og uppbyggjandi sambandi millum listafólk og skúla.

Skúlarnir gjalda einki fyri vitjanir. Norðurlandahúsið, Mentamálaráðið og kommunurnar bera allan kostnað.



# TEKNINGARSKJAL OG KUNNING Á

# WWW.LISTALEYPURIN.FO

Kommunusamskipan Føroya

FØROYA KOMMUNUFELAG

Mentamálaráðið

norden
Norðurlandahúsið
í Føroyum

SENDISTOVAN